UMHVØRVIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn
Føroyar

Tórshavn, tann 16. august 2021
J.nr.: 21/15690-2

Svar upp á § 52a-fyrispurning nr. 52-014/2021 frá Beintu Løwe Jacobsen, løgtingsmanni, um útgjald úr Barsilsskipanini

Spurningarnir vóru soljóðandi:

1. *Hví er barsilspeningur útgoldin afturút og á kontu fjórða gerandisdag í hvørjum mánaði?*
2. *Hvat ætlar landsstýrismaðurin at gera, so foreldur, ið fáa barsilspening, hava somu treytir, sum aðrir lønmóttakarar, og fáa pening á kontu seinasta í hvørjum mánaði?*

Í § 1, stk. 3, í kunngerð nr. 91/2001 um umsiting av Barsilsskipanini er ásett, at barsilspeningur verður roknaður og útgoldin afturút fyri ein mánað í senn. Barsilspeningur er veiting, sum kemur í staðin fyri løn, og verður tískil útgoldin eins og løn ofta verður útgoldin, t.e. afturút mánaðarliga.

Barsilspeningur kann kortini ikki handfarast eins og løn, tí útrokningin av barsilspeningi kann, sambært Barsilsskipanini og Elektron, sum umsitur tøkniligu skipanina, ikki gerast fyrr enn tann fyrsta í einum mánaði. Hetta kemst av, at verður upphæddin roknað áðrenn tann fyrsta í mánaðinum, er upphæddin ikki rætt, tí seinasta løn í einum mánaði fer gjøgnum lønarskránna millum 24. og 26. í mánaðinum. Skal henda løn takast við í útrokningina, skal farloyvi afturførast og lønin skrásetast soleiðis, at hon hongur í skipanini til mánaðin eftir. Hetta er sera arbeiðskrevjandi, tí tað skal gerast manuelt.

Mannagongdin í dag er, at Elektron ger útrokningarnar fyrsta arbeiðsdag í mánaðinum, tá allar lønir eru farnar gjøgnum lønarskránna. Dagin eftir, annan arbeiðsdag, eftirkannar og góðkennir Barsilsskipanin útgjøldini og sendir Føroya Gjaldstovu hesi at avgreiða. Triðja arbeiðsdag avgreiðir Føroya Gjaldstova útgjøldini og sendir tey til Betri Banka, sum síðani sendir útgjøldini víðari til hinar bankarnar. Útgjaldið er sostatt á kontu fjórða arbeiðsdag í mánaðinum.

Ætlandi verður farið undir at gera eina nýggja tøkniliga loysn í sambandi við útgjald av barsilspeningi. Í hesum sambandi verða omanfyrinevndu viðurskifti tikin við, og miðað verður eftir at bera so í bandi, at tey, sum fáa barsilspening, fáa hann á kontu seinasta arbeiðsdag í mánaðinum.

Helgi Abrahamsen
landsstýrismaður